AVTALA

Millum undirritaðu

Føroya Arbeiðarafelag

100 Tórshavn

og

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

100 Tórshavn

er í dag gjørd hendan avtala um lønar- og setanartreytir fyri arbeiðsfólk, sum starvast hjá IRF.

§ 1

Partarnir eru samdir um, við tí ískoyti, sum nevnt eru í grein 2, at fylgja tí til eina og hvørja tíð galdandi høvuðssáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

§ 2

Arbeiðsfólk fáa, umframt sáttmálalønina, tvs. grundløn og møguliga yvirtíðarløn, eina fasta viðbót kr. 2.910,00 um mánaðin, sum kemur í staðin fyri tær viðbøtur, sum ásettar eru í grein 2 b og c umframt í greinunum 3, 4 og 5 í høvuðssáttmálanum.

Eisini fáa arbeiðsfólkini aldursviðbøtur sambært nevnda høvuðssáttmála.

Viðbótin nevnd í grein 2, stk. 1 hækkar samsvarandi hækkingunum av lønini í høvuðssáttmálanum, sum nevndur er í grein 1.

§ 3

IRF skal geva arbeiðsfólkunum tær upplýsingar, sum lógin um setanarprógv krevur.

§ 4

Hendan avtala fær gildi tann 01.01.2013 og kann sigast upp við 3 mánaðar freist til ein 1. mai, fyrstu ferð til 1. mai 2014.

§ 5

Avtalan verður undirskrivað í tveimum eintøkum soleiðis at hvør partur fær sítt eintak.

Tórshavn, tann 21 - 5 2013

| Føroya Arbeiðarafelag | Kommunala Arbeiðsgevarafelagið |
|---|---|